[ Juli ]

# Føroyar fáa gott úrslit í Hetlandi

**Føroyar vinna 15 gullmerki á Oyggjaleikunum, sum verða hildnir í Hetlandi. Tað eru tó alsamt færri ítróttargreinar, sum draga tað stóru mongdina av heiðursmerki heim til Føroya**

Eini 130 føroysk ítróttarfólk eru við á Oyggjaleikunum, sum verða hildnir í Hetlandi, og samlaða úrslitið er tað næstbesta, sum føroyingar nakrantíð hava fingið á Oyggjaleikum.

24 lond taka lut í Hetlandi, og tey hava sent sløk 2000 ítróttarfólk til leikirnar. Kappast varð í 15 ymiskum ítróttargreinum, og føroysk ítróttarfólk vóru við í 10 av hesum greinum.

Og tað eydnast eisini at vinna heiðursmerki í flestu av ítróttargreinunum, sum føroyingarnar taka lut í.

Samanlagt vinna Føroyar 15 gullmerki, 11 silvur og 20 bronsu, og á samlaða yvirlitinum gevur tað Føroyum eitt fimta pláss. Guernsey vinnur flest heiðursmerki.



*Triðju ferð á rað vinna føroysku fótbóltskvinnurnar gull á Oyggjaleikunum í Hetlandi. Hesaferð er mótstøðan størri enn onkuntíð, men føroysku kvinnurnar hava avgerandi munin*

## Vandatekin

Hóast úrslitið er gott, so eru eisini onkur vandatekin at síggja í heiðursmerkjabýtinum. Tí tað eru alsamt færri ítróttargreinar, sum vinna stóran part av føroysku heiðursmerkjunum.

Í bogaskjóting vinna føroyingar 8 heiðursmerki, í fimleiki 14 og í svimjing 12. Hinvegin klárar frælsi ítróttin ikki at vinna nakað heiðursmerki hesaferð, og tað er eitt vónbrot. Heldur ikki í súkkling eydnast føroysku luttakarunum at vinna nakað heiðursmerki.

– 15 gullmerki er flott. Eingin ivi um tað. Men konsentratiónin av heiðursmerkjum innan ávísar ítróttargreinar, staðfestir, at verður ikki okkurt munagott gjørt, so verða Føroyar av álvara eftirbátar um heilt stutta tíð, skrivar Sosialurin eftir Oyggjaleikirnar.

– Fyrst og fremst, so eru tað umstøðurnar, sum vanta. Á seinastu leikunum hava vit sæð, at stórir ítróttardeplar eru antin bygdir ella renoveraðir, soleiðis at hesir kunnu vera sentrum fyri fleiri kappingargreinum. Men umframt praktiska týdningin, tá leikir verða fyriskipaðir, so hava hesir eisini víst seg at hava alstóran týdning fyri ítróttarligu menningina.

## Ítróttardepil í Føroyum

Sosialurin skrivar, at ein líknandi ítróttardepil í Føroyum kundi veruliga skunda undir menningina av nógvum ítróttargreinum.

– Stadion til frælsan ítrótt verður í løtuni fyrireikað í Havn, og hetta fer uttan iva at økja um tilgongd og menning innan tær greinar, sum kappast verður um her. Men skal eitt veruligt elituumhvørvi skapast, er helst neyðugt við einum depli. Einum depli, har fólk úr fleiri ítróttargreinum dagliga umgangast hvør annað, og har synergieffektin av hesum vil styrkja allar partar.

Júst langsiktaða árinið av einum slíkum depli eigur helst at vera fremsta orsøkin til, at Føroyar aftur mugu og skulu arbeiða fram ímóti einum nyðøggjum vertskapi av oyggjaleikum. 2013 er longu sett sum mál, og hóast tað kann tykjast sum góð tíð, so merkir hetta veruleikanum, at allir hentleikar helst skulu vera tøkir longu á sumri 2009, tá tann atkvøðugreiðslan stendur fyri framman, skrivar Sosialurin.

» Fakfeløgini hava hvør í sínum lagi hava vart sítt egna kongaríki. Heldur enn at hava heildina í huga, hava fakfeløgini í alt ov stóran mun dyrkað síni egnu áhugamál, og tað hevur avgjørt verið ein forðing fyri at nútímansgera føroyska arbeiðsmarknaðin.« «

*- Johan Páll Joensen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag*

» Mítt lív hevur verið ein bardagi móti fíggjarligum ójavna, órímiligum stættarmuni og skeivum umbýti av samfelagskøkuni, og hesi sosialdemokratisku virði hava verið drívmegin handan alt mítt politiska virksemi og lív.« «

*- Mogens Lykketoft, politikari*

**Steypafinalurnar í fótbólti verða spældar. Hjá monnum vinnur GÍ finaluna á ÍF, meðan B36-kvinnurnar vinna á KÍ í teirra finalu.**

## Hergeir mitt í rokanum

Enski høvuðsstaðurin London verður skakaður av fleiri bumbuspreingingum, og løgtingsmaðurin Hergeir Nielsen endaði mitt í rokanum, tá ið bumburnar brustu. Hergeir Nielsen hevur júst vitjað á Isle of Man í sambandi við setanina av tinginum á Tynwald, og tað var á vegnum heimaftur til Føroya, at hann endaði mitt í ruðuleikanum í London.

Hergeir Nielsen var staddur á jarnbreytastøðini við King´s Cross, tá ið ein bumba brast har, og hann varð í ruðuleikanum evakueraður av jarnbreytastøðini. Løgtingsmaðurin fekk ongan skaða.

## Jenis-sangurin avhøvdaður á Rás 2

Í heilar trettan vikur hevur lagið Muscleman blað hjá punk-bólkinum 200 ligið á hit-listanum 15 tær bestu hjá Útvarpi Føroya. 200 er ein bólkur, ið er kendur fyri sínar provokerandi tekstir, men fleiri halda, at í hesum lagnum er bólkurin farin út um mark.

Ein av teimum er Petur Jacobsen á Rás 2. Hann vil ikki hava hetta lagið spælt á sínari útvarpsstøð og hevur tí heitt á síni starvsfólk um ikki at spæla lagið.

– Talan er um eitt persónligt álop á Jenis, og slíkum vil eg ikki stuðla við at spæla lagið á míni útvarpsstøð, sigur Petur Jacobsen.

## Europe í Gøtu

Útselt er til G! Festivalin í Gøtu, og tey mongu fólkini, sum hava leitað sær á festivalin, kunnu hoyra nógva og fjølbroyttan tónleik.

– Europe vóru høvuðsnavn á ársins G! Festivali. Tað sást á nógvu fólkunum, sum vóru stúvað saman á sandinum fyri at hoyra gomlu svensku rokkstjørnurnar.Men tað var bert í hendinga løgum, at Europe fingu ordiliga fatur í fólkinum, skrivar ummælarin hjá Sosialinum.

Hinvegin fær danski bólkurin Nephew sera gott skoðsmál frá ummælarum og fólkum á festivalinum.

– Nephew var bara tað allarbesta leygarkvøldið. Tað var UG! og alt hatta har, skrivar ummælarin hjá Sosialinum.